

## Fara at práta við løgmann

Sosialurin fer at venda sær til Jóannes Eidesgaard, løgmann, um ætlanir við loftrúminum yvir Føroyum, og vit fara eisini at spyrja hann, hvussu gongur við nýggja radaranum, sum ætlanin er at seta upp í Mjørkadali. Í greinini niðanfyri nevnir Finnbogi Niclasen, flogvallaovasti, at tað kom eitt sindur óvart á íslendingar, sum umsita loftrúmið yvir Føroyum, at radarin í Mjørkadali varð tikin niður, og vit fara ætlandi eisini at venda okkum til Navier í Danmark, ið leigar út til Vága Floghavn arbeiðsfólkið í eftirlitstorninum á flogvøllinum.

# Sivilur radari setast upp í Mj

**- Tað eru tey, sum vilja vera við, at tað er eitt ávíst tómrúm yvir okkara loftrúmi, sum ikki var við gomlu radarskipanini, men eg dugi illa at ímynda mær, at ikki alt loftrúmið yvir Føroyum er sjónligt hjá teimum, sum hava brúk fyri at vita, hvat gongur fyri seg, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallaovasti**

LOFTRÚM
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir at danska verjan tók radaran niður í Mjørkadali, eru tað føroyingar, sum halda, at lítil og eingin radardekningur er í loftrúminum yvir Føroyum. At radarin varð tikin niður, kom eftir hvat skilst eisini heldur illa við hjá Kontrolsentralinum í Reykjavík, haðani flogferðslan til og úr Føroyum verður stýrd.

Vága Lufthavn hevur samstarv við Navier (Flyvesikringstjenesten) í Danmark um fólkið, sum arbeiðir í torninum í Vágum. Tað er soleiðis, at tey seks, sum arbeiða í Vágum, eru leigað frá Navier, og tað er eisini Navier, sum ger avtalurnar við Ísland fyri føroysku loftferðsluna.

Finnbogi Niclasen, flogvallaovasti, sigur, at øll tey seks, sum arbeiða í torninum, eru føroyingar, og tey hava fingið sína útbúgving og eftirútbúgving hjá Navier.

- Vit hava eitt gott samstarv við Navier, og vit hava eisini gott samstarv við Kontrolsentralin í Reykjavík, sigur flogvallaovastin.

Tá radarin í Mjørkadali varð tikin niður, fóru íslendingar at arbeiða við at fáa ein annan radara settan upp, men hesum kom einki burtur úr.

Seinni er so løgmaður farin í gongd við at fáa okkurt gjørt við hetta, og mangt bendir nú á, at nýggjur radari verður settur upp í Mjørkadali seinni í ár ella fyrst í komandi ári.

Føroyar vóru í nógv ár partur av eini ketu, sum varð rópt Early Warning, sum í fyrsta lagi fevndi um alt Norðuratlantshavið.

Orsøkin til, at henda skipan varð tikin niður, var, at tøknin er so nógv ment við nógv fleiri møguleikum enn áður.

Ísland hevur sínar radarar, sum røkka yvir ein part av Norðuratlantshavi, og harafturat fær Kontrolsentralurin eisini myndir av loftrúminum yvir Føroyum.

- Men so vítt eg veit, eru tað tey, sum vilja vera við, at tað er eitt ávíst tómrúm yvir okkara loftrúmi, sum ikki var við gomlu skipanini, sigur Finnbogi Niclasen, sum kortini illa dugir at ímynda sær, at ikki alt loftrúmið yvir Føroyum er sjónligt hjá teimum, sum hava brúk fyri at vita, hvat gongur fyri seg.

Flogvallaovastin hevur tó varhugan av, at Kontrolsentralurin í Reykjavík kundi ynskt sær uppaftur betri dekning av loftrúminum yvir Føroyum.

- Men so vítt eg havi skilt, eru føroyskir og danskir myndugleikar samdir um at seta upp ein sonevndan sekunderan og sivilan radara, sum hann tekur til, og tað verður Navier, sum kemur at taka sær av radaranum.

Tað verður danska ferðslumálaráðið, sum kemur at fíggja hesa íløgu.



# Granskað verður í tannfiski

**Smáir sendarar verða settir á fiskin, sum geva upplýsingar um, hvar fiskurin ferðast - hvørjum dýpi hann er á, og hvønn hita í sjónum honum dámar**

GRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Falklandsoyggjunum eru tey farin undir at granska tannfisk, sum er ein eftirspurdur og kostnaðarmikil fiskur.

Tað var tann tíð, tá fleiri føroyingar fiskaðu tannfisk í Suðuríshavinum og tjentu nógvan pening. Hetta var serliga við skipum, sum norðmenn høvdu við at gera.

Seinni fóru lond at seta treytir við veiði eftir tannfiski, og veiðan gjørdist meira skipað.

Nú eru fólk á Falklandsoyggjunum so farin at seta smáar sendarar á fisk, sum skráseta hvørjum dýpi fiskurin heldur til á, og hvønn hita í sjónum honum dámar best.

Smáar »flísir« verða sett á fiskin, og eftir seks mánaðum loysna tær av sær sjálvum og flotna.

Tað er World Fishing, sum ber hesi tíðindi.

Higartil hava granskarar funnið út av, at tannfiskur ferðast einar 50 metrar upp og niður í sjónum í ein dag, og tað er ikki nógv. Í tíðarskeiðinum frá september til ársenda ferðast tannfiskur heilt niður á 1200 metra dýpi, har hitin liggur um 2,5-3,5 stig.

Tannfiskur kann gerast meira enn tveir metrar langur og viga upp í eini 300 pund.

Fiskurin livir á djúpum vatni í Kyrrahavinum, í suðuramerikanskum sjógvi og kring oyggjarnar við Antarktis.



*Tannfiskur kann gerast meira enn tveir metrar langur*